## 425 mia. til verjumál

Kina fer at brúka 425 milliardir krónur til verjuna í ár. Tað merkir, at játtanin er góð sjey prosent størri enn í fjør, og tað er minni, enn eygleiðarar høvdu væntað. Teir halda, at tann skerdi vøksturin er ein avleiðing av altjóða búskaparkreppuni. Ein talsmaður fyri stjórnina í Beijing sigur, at Kina brúkar lutfalsliga lítið av pengum til verjuna sammett við tað, sum USA, Bretland, Frakland og Russland brúka. Hann vísir á, at USA brúkar fýra prosent av sínari bruttotjóðarframleiðslu til verjuna, men at Kina brúkar bara 1,4 prosent.



## Loyniligt um Madeleine

Fjølmiðlar hava nú avdúkað, at løgreglan í Portugal hevur fleiri loyniligar frágreiðingar um málið við ensku gentuni Madeleine McCann, sum hvarv har fyri skjótt trimum árum síðani. Sambært fjølmiðlunum er talan um fleiri hundrað síður, sum løgreglan hevur dult. Eitt nú er talan um eina vitnifrágreiðing hjá einum fólki, sum segði seg hava sæð ein mann toga eina smágentu upp í eitt flogfar í portugisiska býnum Faro somu nátt, sum Madeleine hvarv. Í einum øðrum føri er talan um myndir úr einum eftirlitstóli í Ný Sælandi, sum vísa ein mann við einari smágentu, ið líkist Madeleine McCann.

# Provokera leirvíkingar til primitiva framferð



- Tað kann ikki passa, at vit í 2010 skulu brúka so primitiva framferð, men eg skilji væl, at tolið hjá leirvíkingum er uppi, sigur borgarstjórin í Klaksvík, Gunvá við Keldu

**Borgarstjórin í Klaksvík skilir væl, at leirvíkingar eru leiddir og keddir av landsstýrinum, men hon heldur kortini, at tað er primitivt at hótta við at byrgja 6000 fólk inni**

NORÐOYATUNNILIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Eg skilji Leirvíkingar so hjartaliga væl.

Gunvá við Keldu er borgarstjóri í Klaksvík og hon hevur sjálvandi stóran áhuga í søguni í Sosialinum í gjár um, at býráðið í Eysturkommunu nú hevur kravt, at vegurin í sambandi við Norðoyatunnilin beinanvegin verður lagdur undir mold aftur og at lendið verður latið kommununi aftur í sama standi, sum tað í síni tíð varð latið til vegin.

Borgarstjórin í Eysturkommunu ásannar, at hetta er ein ógvuslig avgerð, men býráðið veit sær ongi onnur ráð fyri at fáa landsstýrið at seta gongd arbeiðið at gera vegin, sum skal vera ígjøgnum Leirvík í sambandi við Norðoyatunnilin.

Hetta hevur sjálvandi sett ein hvøkk í norðoyingar.

### Ein provokatión

Men hóast borgarstjórin í Klaksvík skilir leirvíkingar, heldur hon kortini, at tað er primitivt at hótta við at taka farleiðina frá 6000 borgarum og fleiri vinnuvirkjum, sum standa fyri einum stórum parti av okkara útflutningi.

Men hon uppfatar samtyktina hjá býráðnum í Eysturkommununa meiri sum eina provokatión fyri at fáa nakað at henda.

- Leirvíkingar hava ført síni sjónarmið fram í fleiri ár, men tey verða ikki hoyrd og tað er ógvuliga óvirðiligt av landsstýrinum, at málið ikki er loyst.

- Vegaføringin ígjøgnum Leirvík er eitt mál, sum hevur drigið alt ov leingi út og vit mugu bara staðfesta, at í hesum máli hevur landsstýrið ikki verið verið sína uppgávu vaksið.

- Og so er tað enda við eini samtykt, sum er eitt sindur provokerandi og tað skilji eg fyri so vítt væl.

- Men vit liva í 2010 og eg kann ikki ímynda mær, at framferðin so primitiv, at vegurin verður grivin av, leggur hon afturat.

Hon staðfestir, at Klaksvíkar Kommuna er ikki partur í málinum sum so, men eg skilji samtyktina hjá býráðnum sum eina roynd at provokera eina loysn ígjøgnum.

Hon hennara áheitan á landsstýrið er at loysa málið alt fyri eitt, tí tað kann heldur ikki vera rætt, at hetta málið ár um ár skal víkja fyri øðrum útbyggingum.

# Gongur betri at halda skil á landsstýrisfólkum

**Í 2008 brúktu landsstýrisfólk 158 milliónir ov nógv, men í fjør var meirnýtslan tódnað niður í 20 milliónir, men andstøðan er ikki hugtikin av gongdini**

FÍGGJARSTÝRING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað gongur væl betri nú at halda skil á peninganýtsluni hjá landsstýrisfólkunum, enn tað hevur gjørt undanfarin ár.

Tað staðfesti Jóannes Eidesgaard, landssýrismaðurin í fíggjarmálum, í Løgtinginum týsdagin.

Hann vísti á, at í 2008 brúktu tey ymsu landsstýrisfólkini 158 milliónir krónur meir enn játtanin var, sum tey høvdu fingið á fíggjarlógini.

Men í fjør var óheimilaða meirnýtslan komið niður á 20 milliónir.

Tað vísir ein fyribils uppgerð hjá fíggjarmálaráðnum yvir støðuna fyri í fjør.

Hann legði afturat, at verður hugt eftir meirnýtsluni í fjør, er tað barsilsskipanin, sum er tann størsti syndarin, tí har er meirnýtslan 4,4 milliónir krónur.

Annars eru tað ávísir stovnar, sum altíð standa fyri skotum fyri at hava brúkt meir enn teir hava fingið játtað og ein av teimum er Landssjúkrahúsið.

Men Jóannes Eidesgaard upplýsti, at á Landssjúkrahúsinum lupu 20.000 krónur av í fjør.

Hinvegin varð játtanin til fyritíðarpensjón yvirtrekt við 9,4 milliónum í 2008, men í fjør var meirnýtslan ein millión.

Sama gongdin var í játtanini til fólkapensjón, sum var yvirtrekt við seks milliónum í 2008, men har meirnýtslan var komin niður á 977.000 krónur í fjør.

Annars hevur játtanin til vanliga forsorg og játtanin til rentustuðul onga meirnýtslu í fjør, har meirnýtslan var ávikavist 14 millónir og 11,5 millónir í 2008.

Játtanin til serviðgerð uttanlands plagar aldrin at halda og í 2009 var meirnýtslan har ikki meiri enn 3,6 milliónir.

Hann vísti á, at við í hesum tølunum eru eisini játtaninar, sum eru lætnar á eykajáttanum, men hann helt eisini, at tølini vístu avgjørt, at tað gekk rætta vegin

Men hetta eru alt lógarbundnar útreiðslur, sum landskassin ikki sleppur undan at gjalda.

### Kosta næstan 400 milliónir

Men ikki øll eru líka hugtikin av hesi gongdini sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum er.

Heini O. Heinesen staðfesti, at orsøkin til, at meirnýtslan er fallin so nógv, er rætt og slætt at tað eru ongir pengar at hava nakra meirnýtslu við.

Høgni Hoydal í Tjóðveldinum vísti á, at einasta orsøk til, at meirnýtslan varð minkað, var, at andstøðan hevði lagt hart trýst á samgonguna og at fjølmiðlar høvdu fylgt við málinum og tað endaði við, at tann eisini landsstýrismaðurin, Hans Pauli Strøm, mátti enntá leggja frá sær.

Formaðurin í Tjóðveldi staðfesti, at hevði fíggjarstýringin verið líka vánalig í øðrum norðurlondum, sum hon hevur verið í Føroyum, hevði tað langt síðani fingið avleiðingar fyri ráðharrarnar og stjórnarleiðaran, sum skal hava eftirlit við ráðharrunum.

Hann vísti á, at síðani 2004, hevur ólóglig meirnýtsla hjá landsstýrinum kosta landskassanum næstan 400 milliónir og tað er bara tí at onki eftirlit er og tað er størsta orsøkin til hallið á fíggjarlógini.